# Er idealisturin druknaður í marglæti

TÓRA VIÐ KELDU



**Summarfrítíðin er uppløgd tíð, har vit kunnu byrja av nýggjum, steðga á og gera eina eftirmeting av seinasta ári**

Fólkaræðisliga samfelagið skal veita karmar, har einstaklingurin kann gerast virkin, hava ávirkan og vera skapandi. At vera virkin, skapandi og at vilja hava ávirkan er í dag á mangan hátt vorðið “flógvir flosklar”, sum bara hoyra til. Okkurt skulu vit siga, og helst skal tað ljóða skilagott. Minni ger, um vit føra tað út í lívið - tað kunnu onnur gera.

**Idealistarnir**

Um vit hugsa okkum, hvussu heimurin hevði sæð út um Florence Nightingale, Martin Luther King, Hellen Keller, Móðir Teresa, Gandhi, Dalai Lama, Nelson Mandela ella rørslur sum Frelsunarherurin - William Booth og fyri alt tað Njál Djurhuus - ella Skótarnir - Baden-Powell - vóru forðað av persónligum orsøkum ella bara settu seg at lýsa støðuna heima í stovuni, søgdu alt, onnur átti at gjørt ella bara bíðaðu eftir øðrum. Nei, hesi valdu øll á ein ella annan hátt at gera mun. At vera virkin, skapandi og hava ávirkan.

Samfelagið skal gera tað liviligt og virðiligt fyri tey sjúku, tey, ið bera brek, tey gomlu og ikki minst fyri børnini. Hini - eg og tú - eru tey, sum skulu vera við at skapa og menna virðiligt lívið í okkara lítla samfelag.

Vit hava øll meinig um, hvussu samfelagið skal síggja út, men samfelagið er ikki betri enn vit sjálvi gera tað. Tað eru jú vit, sum eru samfelagið. Nógv kundi verið broytt, og tað kann altíð gerast betri. Tó er ofta lættast at geva øðrum skuldina: skipanini, politikarum, løggevandi valdinum, skúlanum, umstøðum o.s.fr. Men tað eru vit, sum skulu hava ávirkan og gera okkum ómak.

**Dagsins idealistar**

Børn eru idealistar. Tey liva her og nú, ikki fyri vinning ella heiður. Tó mugu vit minnast til, at børnini skulu meir enn bara liva. Heimliga umhvørvið má skapa neyðugu karmarnar fyri børnini at virka og mennast.

At vera virkin, skapandi og at gera mun er treytað av lívinum annars og er rættiliga krevjandi. Fyrst og fremst krevst eitt sjálvsálit og síðani áræði - eginleikar, sum vit ikki verða fødd við, men sum verða skaptir í einum góðum og gevandi umhvørvi. Um børn okkara skulu vita, hvat eitt gott og gevandi lív er, mugu vit vaksnu vera fyrimyndir og skapa hesar neyðugu karmar fyri børn og ungdómar okkara. At fáa eitt virkið uppvaksandi ættarlið má vera eitt av greiðu málum okkara. Vælkendu flosklarnar mugu vit blása nýtt lív í og fáa at virka.

Grundleggjandi treytir fyri menning er, at børn og ung hava orku at savna tankarnar. Sum lærari síggi eg ovurstóran týdning í, at foreldur ella vaksin tosa við børnini, eru saman við teimum, eru áhugað í tí, tey gera, ráðføra teimum, hjálpa teimum at raðfesta, seta greið mørk, geva teimum heilsugóðan mat, syrgja fyri at tey fáa nóg mikið av svøvni og fáa tey at gera skúlating. Skuldi verið óneyðugt at sett orð á hetta, men hetta eru sjónligir manglar í samfelagnum.

**Gera heldur enn at tosa**

Um vit bara tosa og ikki gera, hví skal uppvaksandi ættarliðið vera øðrvísi. Vit skulu vísa teimum, at tað er neyðugt at vera virkin, og at tað er møguligt at ávirka í verki. Vit mugu vera eitt slag av idealistum, sum ikki arbeiða fyri vinning ella æru, men heldur síggja vinningin í teimum, vit hava ábyrgd av.

Av og á mugu vit líka sum steðga á og spyrja, hvussu gongur. Summarfrítíðin er uppløgd tíð at byrja av nýggjum, steðga á og gera eina eftirmeting av seinasta ári. Hvat er neyðugt, hvat er gott, hvat hevur týdning, hvat eiga vit gera meir við og hvat átti at verið broytt.

Eg havi huga at spyrja, um vit veruliga hava eitt greitt mál, okkurt, vit brenna fyri og neyðuga viljan at gera okkara besta - ella er idealisturin bara druknaður í marglæti, har tað altíð eru onnur, sum skulu gera og skapa, meðan vit bara eru líkasælir eygleiðarar.




Tíðargreinin

# … Landssjúkrahúsið – Bábelstornið við Sandagerð

**‘Skeri eg teg her missi eg teg har’**

Tað er skyldan hjá politikararanum at greina, hvat heilsupolitikkurin eigur at snúgva seg um. Skulu vit leggja dentin á fyribyrgjandi tiltøk ella skulu vit serliga leggja okkum eftir at viðgera sjúkur? Hvat er best fyri samfelagið sum heild? Skulu vit vaksinerað fyri krabbamein í lívmóðrini? Skulu vit hava eina skilaliga heilsurøktarskipan á barnastovnum og í skúlum? Hesar spurningar eiga politikarnir at taka støðu til – og seta fíggingina í mun til politisku ambitiónirnar. Eitt er í hvussu so er vist: verður heilsupolitikkurin ikki greinaður og avmarkaður, kemur ikki annað burturúr enn eitt ævigt klandur um, hvussu nógv ið skal – ella kann – verða brúkt til viðger. Skal sparast, er bara ein gongd leið, og tað er at skerja viðgerðirnar.

Verða viðgerðinar skerdar, missa vit heilsustarvsfók – ella tá kunna tey verða uppsøgd. Og tað ger mun. Tá ið so Landssjúkrahúsið er piðað inn á bein, kunnu Føroyar rósa sær av at hava heimsins glæsiligasta lasarett standandi úti við Sandagerð. Men her hava politikararnir skapt sær eitt ótýdligt limbo, tí eingin av teimum vil vera við, at Landssjúkrahúsið ikki skal viðgera sjúk fólk. Teir vilja hava bæði greivabitan og konubitan. Teir vilja hava meira viðgerð, samstundis sum teir nokta at játta tað, sum tað kostar. Fyri tað kundu teir eins væl kravt at tyngdarlógin verður avtikin. Men áðrenn teir fara at gera tað, kundu teir kanska hugt nærri at tí sjúkrahúsverkinum, vit hava. Er tað lagað eftir føroyska samfelagnum? Kundi tað verðið rikið skynsamari og bíligari?

**Tær heilagu kýrnar**

Tað slepst ikki undan, at skulu hesir spurningar lýsast líkindaliga, noyðast vit at stumpa undir ta viðbreknastu, heilagu, heilsupolitisku kúnna her á landi:

Tað er eitt óskiljandi paradoks, at vit framvegis hava trý sjúkrahúsini, ið verða rikin sum sjálvstøðugir stovnar við somu grundleggjandi, fakligu greinunum og harafturat hava akutt-funktiónir. Politikararnir vita - vit vita - øll vita - at sjúkrahúsverkið hevði gagnað samfelagnum betur, um tað var rikið við einum miðvísum heilsupolitiskum endamáli. Tað er ein sannroynd, at skulu fakligu førleikarnir hjá heilsustarvsfólki haldast við líka, er neyðugt at hava rutinu í fakligu mannagongdunum. Tað fer at knípa við førleikunum, um viðgerðir av øllum slag verða spjaddar til heili trý sjúkrahús við einum fólkagrundarlagi, ið er minni enn 50.000. Og tað kostar meira enn tær 30 milliónirnar, sum aktuella klandrið snýr seg um. Serfrøðingarnevndin, ið skal kanna viðurskiftini í sjúkrahúsverkinum, kemur í hvussu so er fram til eina prinsipiella niðurstøðu, niðurstøðu, og hon verður, at vit- eins og aðrastaðni í heiminum - eiga at skipa sjúkrahúsverkið eftir fólkagrundarlagnum.

**Eitt sjúkrahús og tvær eftirviðgerðareindir**

Bæði suðuroyingar og norðoyingar vita, at dygdin av sjúkraviðgerð verður ikki betri, jú fleiri sjúkrahús vit hava. Um so var, skuldi sjúkrahús verið á hvørjum tanga. So vítt eg havi skilt, eru tað heldur ikki suðuroyingar ella norðoyingar, ið forða fyri, at teirra sjúkrahús verða brúkt soleiðis, at alt landið fær fleirfaldaða nyttu av teimum sum eftirviðgerðareindir, og at Landssjúkrahúsið tekur sær av kliniskari viðgerð burturav. Ein slík skipan hevur einki við leiðslu av sjúkrahúsverkinum at gera. Tað er heilsupolitikkur. Politikaralæknin veit ivaleyst eisini, at tað eru bæði góðir og vánaligir trolaraskiparar. Men teir verða ikki betri av, at reiðarin situr við skrivaraborðið og gevur skiparanum boð um, hvussu hann skal sigla og fiska. Við boðskapi sínum avdúkar læknapolitikarin, at hann ikki hevur meiri skil á heilsupolitikki enn kortteknarin hevur á at føra skip. Tað hevði sømt seg betur fyri tey fólkavaldu í Løgtinginum at víst politiskt dirvi – at komið við einum heilsupoltikki, ið er grundaður á tær samfelagsligu treyturnar, vit hava, og á tað heilsuliga tilfeingið, vit eiga.

Men stríðið um Landssjúkrahúsið, hetta herostratisk ólekiliga, ‘babelsyndromið’, er aftur í fullum blóma, og politikararnir spjaða heldur enn at samlað. Teir hjúklað um ein sjúkan heilsupolitikk heldur enn at royna at lekja hann og fáa hann at trívast, og sjálvir tykjast teir at trívast við, at so er.